

# Tríggir útlendingar komnir til Toftir

B68 hevur leitað sær nýggjan útlendskan styrk, nú felagið er komið upp í Formuladeildina aftur. Tríggir av hesum útlendingum komu til landið fríggjadagin. Tveir av teimum komu longu leiðina úr Senegal, har hitin lá um 36 hitastig fríggjadagin. Tað eru 20 ára gamli Landing og 21 ára gamli Badara. Umframt teir báðar er danin Jacob Bymar, sum áður hevur spælt fyri KÍ, eisini komin til Toftir. Umframt hesar tríggjar skal B68 eisini hava serbiska málmannin Vlada Filipovic og hollendska miðvallaran Ralph van Dooren í hópinum í ár. Søgur hava eisini gingið um, at B68 møguliga fær onkran útlendskan spælara afturat.

## Hondbóltur

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 14 | 12 | - | 1 | - | 1 | 413 | 308 | 105 | 25 |
| 2 VB | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 307 | 267 | 40 | 18 |
| 3 Neistin | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 316 | 309 | 7 | 14 |
| 4 Kyndil | 14 | 5 | - | 1 | - | 8 | 319 | 359 | -40 | 11 |
| 5 StÍF | 14 | 4 | - | 1 | - | 9 | 317 | 358 | -41 | 9 |
| 6 VÍF | 14 | 2 | - | 1 | - | 11 | 294 | 365 | -71 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 407 | 330 | 77 | 23 |
| 2 Neistin | 14 | 9 | - | 1 | - | 4 | 404 | 377 | 27 | 19 |
| 3 Kyndil | 14 | 7 | - | 0 | - | 7 | 367 | 386 | -19 | 14 |
| 4 VÍF | 14 | 6 | - | 1 | - | 7 | 383 | 400 | -17 | 13 |
| 5 H71 | 13 | 6 | - | 0 | - | 7 | 355 | 356 | -1 | 12 |
| 6 KÍF | 14 | 1 | - | 1 | - | 12 | 338 | 405 | -67 | 3 |

## Flogbóltur

### Meistaradeild kvinnur

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 14 | 13 | - | 1 | 41 | 10 | 31 | 15 |
| 2 ÍF | 12 | 10 | - | 2 | 32 | 12 | 20 | 10 |
| 3 Dráttur | 14 | 9 | - | 5 | 32 | 23 | 9 | 10 |
| 4 KÍF | 13 | 6 | - | 7 | 25 | 23 | 2 | 7 |
| 5 Mjølnir | 13 | 5 | - | 8 | 20 | 29 | -9 | 5 |
| 6 TB | 14 | 4 | - | 10 | 17 | 33 | -16 | 5 |
| 7 Fleyr | 14 | 0 | - | 14 | 5 | 42 | -37 | 0 |

### Meistaradeild menn

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 9 | 6 | - | 3 | 24 | 16 | 8 | 7 |
| 2 Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 7 |
| 3 ÍF | 8 | 5 | - | 3 | 19 | 16 | 3 | 6 |
| 4 Fleyr | 9 | 1 | - | 8 | 9 | 26 | -17 | 2 |

## Enska Premier League

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Arsenal | 25 | 18 | - | 6 | - | 1 | 52 | 18 | 34 | 60 |
| 2 Man Utd. | 25 | 18 | - | 4 | - | 3 | 49 | 12 | 37 | 58 |
| 3 Chelsea | 25 | 16 | - | 6 | - | 3 | 38 | 17 | 21 | 54 |
| 4 Everton | 25 | 13 | - | 5 | - | 7 | 40 | 23 | 17 | 44 |
| 5 Liverpool | 24 | 11 | - | 10 | - | 3 | 40 | 17 | 23 | 43 |
| 6 Aston Villa | 25 | 11 | - | 8 | - | 6 | 44 | 33 | 11 | 41 |
| 7 Man City | 25 | 11 | - | 8 | - | 6 | 32 | 28 | 4 | 41 |
| 8 Blackburn | 25 | 10 | - | 9 | - | 6 | 32 | 31 | 1 | 39 |
| 9 Portsmouth | 25 | 10 | - | 8 | - | 7 | 35 | 26 | 9 | 38 |
| 10 West Ham | 24 | 10 | - | 6 | - | 8 | 29 | 22 | 7 | 36 |
| 11 Tottenham | 25 | 7 | - | 8 | - | 10 | 45 | 41 | 4 | 29 |
| 12 Newcastle | 25 | 7 | - | 7 | - | 11 | 28 | 43 | -15 | 28 |
| 13 Middlesbr. | 25 | 6 | - | 8 | - | 11 | 22 | 38 | -16 | 26 |
| 14 Bolton | 25 | 6 | - | 7 | - | 12 | 26 | 34 | -8 | 25 |
| 15 Wigan | 25 | 6 | - | 5 | - | 14 | 24 | 40 | -16 | 23 |
| 16 Sunderland | 25 | 6 | - | 5 | - | 14 | 24 | 45 | -21 | 23 |
| 17 Reading | 25 | 6 | - | 4 | - | 15 | 30 | 52 | -22 | 22 |
| 18 Birmingham | 25 | 5 | - | 6 | - | 14 | 24 | 37 | -13 | 21 |
| 19 Fulham | 25 | 3 | - | 10 | - | 12 | 25 | 43 | -18 | 19 |
| 20 Derby | 25 | 1 | - | 6 | - | 18 | 13 | 52 | -39 | 9 |

## Enska Championship

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 WBA | 30 | 16 | - | 6 | - | 8 | 65 | 38 | 27 | 54 |
| 2 Watford | 30 | 15 | - | 7 | - | 8 | 49 | 37 | 12 | 52 |
| 3 Bristol City | 30 | 14 | - | 9 | - | 7 | 36 | 37 | -1 | 51 |
| 4 Stoke | 30 | 13 | - | 11 | - | 6 | 48 | 37 | 11 | 50 |
| 5 Charlton | 30 | 13 | - | 8 | - | 9 | 42 | 34 | 8 | 47 |
| 6 Ipswich | 30 | 12 | - | 9 | - | 9 | 47 | 38 | 9 | 45 |
| 7 Crystal P. | 30 | 11 | - | 12 | - | 7 | 37 | 29 | 8 | 45 |
| 8 Hull City | 29 | 12 | - | 8 | - | 9 | 35 | 32 | 3 | 44 |
| 9 Cardiff | 30 | 11 | - | 10 | - | 9 | 41 | 38 | 3 | 43 |
| 10 Burnley | 30 | 11 | - | 10 | - | 9 | 39 | 38 | 1 | 43 |
| 11 Wolves | 30 | 11 | - | 10 | - | 9 | 28 | 30 | -2 | 43 |
| 12 Plymouth | 30 | 10 | - | 10 | - | 10 | 36 | 32 | 4 | 40 |
| 13 Norwich | 30 | 10 | - | 8 | - | 12 | 29 | 35 | -6 | 38 |
| 14 Southampton | 30 | 10 | - | 8 | - | 12 | 38 | 47 | -9 | 38 |
| 15 **Blackpool** | 30 | 9 | - | 10 | - | 11 | 38 | 38 | 0 | 37 |
| 16 Sheffield U | 30 | 9 | - | 10 | - | 11 | 34 | 36 | -2 | 37 |
| 17 Barnsley | 30 | 9 | - | 10 | - | 11 | 35 | 45 | -10 | 37 |
| 18 QPR | 30 | 9 | - | 9 | - | 12 | 37 | 43 | -6 | 36 |
| 19 Coventry | 29 | 10 | - | 5 | - | 14 | 34 | 45 | -11 | 35 |
| 20 Leicester | 30 | 7 | - | 13 | - | 10 | 29 | 29 | 0 | 34 |
| 21 Sheffield W | 29 | 9 | - | 4 | - | 16 | 32 | 38 | -6 | 31 |
| 22 Preston | 30 | 8 | - | 6 | - | 16 | 29 | 38 | -9 | 30 |
| 23 Scunthorpe U | 30 | 7 | - | 9 | - | 14 | 29 | 45 | -16 | 30 |
| 24 Colchester U | 29 | 5 | - | 12 | - | 12 | 41 | 49 | -8 | 27 |

Føroyskir spælarar: Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

# Giants steðgaðu dreymaliðnum

New England Patriots vóru ósigraðir á vegnum til Super Bowl finaluna í amerikanskum fótbólti, men New York Giants tóku øll á bóli í dramatiskum dysti mánanáttina

Kappingarárið í amerikanskum fótbólti endaði mánanáttina við stóru Super Bowl finaluni. Hetta er størsta einsdagskapping í USA, og øll eygu eru vend ímóti finaluni.

Hesaferð vóru New England Patriots stórfavorittar at vinna. Liðið hevði vunnið allar sínar 18 dystir undan Super Bowl, og tað er bert einaferð komið fyri í søguni, at eitt lið hevur vunnið allar sínar dystir í einum kappingarári.

Tá ið góðir tveir minuttir vóru eftir av dystinum, kastaði stóra stjørnan á Patriots-liðnum, Tom Brady, bóltin til ein viðspælara, sum skoraði touchdown, og so líktist tað einum væntaðum sigri til Patriots.

Men Giants bardu seg fram á vøllin aftur, og við stórspæli frá quarterbackinum Eli Manning megnaðu teir at skora eitt touchdown, og harvið vinna dystin 17-14.

Hetta var eitt tað størsta yvirraskilsið í Super Bowl søguni, og teir fegnu Giants-spælararnir feiðraðu sigurin, meðan ein stórur partur av Patriots-liðnum rýmdi av vøllinum, áðrenn tíðin var endaliga farin.